# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein glotti

Tá altjóða dagur ST fyri mannarættindi var herfyri, skrivaðu vit um støðuna hjá teimum fangum, ið eru undir illgruna um yvirgang. Vit gjørdu vart við, at tað ber ikki til at verja fólkaræði við at skerja grundleggjandi mannarættindi. Vit kundu eins væl havt skrivað um støðuna hjá kvinnum í ávísum muslimskum londum. Øll kenna søguna um nítjan ára gomlu saudiarabisku kvinnuna, sum varð neyðtikin av fleiri monnum. Samstundis sum menninir fingu harðan fongsulsdóm, varð neyðtikna kvinnan sjálv dømd fongsul í hálvt ár og hartil varð hon dømd at verða bøðilsflongd við 200 koyrilsløgum.

Fólk um allan heim øtaðust um hendan ræðuliga og barbariska dóm. Úr øllum ættum eru mótmæli komin til stjórnina í Saudi Arabia. Flestu mótmælini eru komin frá mannarættindafelagsskapum, men eisini stjórnarleiðarar hava mótmælt, oftast eftir trýst frá egnum borgarum og felagsskapum í teirra heimlondum. ES hevur gjørt stórt arbeiði í hesum máli og er hetta gjørt eitt nú eftir trýsti frá Danmark. Nú hava so hesi mótmæli borið frukt, og kvinnan hevur fingið náðir – dómurin er vorðin ógildaður.

Tað, sum her er hent, er fyrst og fremst gleðiligt, men hetta at kvinnan er náðað, er eisini sera áhugavert. Hetta er ein glotti í stríðnum fyri mannarættindum. Hetta prógvar, at tað ber til at fáa sjálvt ta mest harðrendu einaræðisstjórn at bakka, um nóg stórt trýst verður lagt á. Saudiarabiska stjórnin er kend fyri ikki at bakka fyri trýsti frá mannarættindafelagsskapum. Hetta land er tiltikið fyri barbariskar revsingar, fyri at nýta deyðarevsing og fyri harðskap móti egnum borgarum. Samstundis hevur landið sterkar vinir í altjóðasamfelagnum og stendst hetta av landsins oljuríkidømi. Saudi Arabia er tætt knýtt at USA, sum hevur sýnt lítlan hug at leggja seg út í mannarættindaviðurkifti í hesum oljuríka landi. Men sum sagt málið um saudiarabisku kvinnuna prógvar, at tað ber til at, sjálvt har útlitini eru verri enn vánalig. Tað ræður tí um, at allir mannarættindafelagsskapir, allar demokratiskar stjórnir, altjóða felagsskapir og einstaklingar um allan heim støðugt eru á varðhaldi og leggja til brots, tá grundleggjandi mannarættindi verða traðkað undir føti.

**Sosialurin**

## Jólamorgun

**FRÍÐGERÐ KJÆRBO**
Skopun

Eg vaknaði tíðliga, sum eg var von. Tað var nakað serligt í morgun. Men eg visti ikki, at klokkan bert var 5. Tað gekk skjótt at fáa eyguni upp, man hann liggja á stólinum, ella við høvdarlagið. Eg trilvaði omanfyri høvdið - jú hann liggur her - jólapakkin. Á sum eg var spent.

Tað var so skímligt inni, so eg fór stillisliga upp og yvir til lampuna, sum stóð á sjatollinum, eg skrúvaði hana eitt lítið sindur upp. Ja, nú bleiv ljóst inni í kamarinum. Eldra systir mín lá í fasta svøvni. Eg fór aftur í songina, so tók eg pakkan í fangið. Á sum eg varð glað, pappírið var so vakurt, við ymiskum litum. Hvat man vera í pakkanum? So fekk eg eyga á ein hvítan pappírsposa sum stóð á stólinum framman fyri songini, hann hevði ein jólamann við einum posa á bakinum á. Eg tók hann og hugdi niður í hann, og veitst tú hvat mamma hevði koyrt niður í hann? Jú tvær appelsinir, tvey súrepli, tvær sjokolátaplátur, ein pakka kongabomm og ein pakka blandað bomm. Eg fekk eina kenslu av gleði og takksemi, tonk alt hetta ísenn! Men nú kundi eg ikki halda mær longur. Eg byrjaði varisliga at taka bandið av pakkanum. Men nú fór systir at røra uppá seg, hon var vaknað av skramblinum av pappírinum. Eg spurdi hana, um hon ikki skuldi vakna nú og vita hvat hon hevði fingið. Hon var ikki sein og reisti seg upp. Jú, hon hevði eisini fingið ein stóran pakka, sum lá við høvdarlagið, og eisini ein pappírsposa við góðgæti, líka sum eg.

Vit byrjaðu at pakka út, eyguni blivu stór, tá vit sóu hvat vit høvdu fingið. Eg fekk eitt døgurðastell og tað var grønt, tað var so vakurt so vakurt. Systir mín fekk eitt koppastell og tað var blátt. Á sum vit vóru glaðar. So fingu vit okkum ein punt av sjokolátu, men tað gekk ikki leingi til vit sovnaðu aftur.

Klokkan mundi vera um 10 tá mamma kom við drekka uppá songina. Vit fingu hvíta kaku, brúna kaku og flekku, so fingu vit eisini kleynuspruttu og jødakaku afturvið. Tað smakkaði so væl, alt sum mamma gjørdi. So fingu vit eisini hvør sítt jólaljós, tey vóru snaraði, annað var grønt, hitt var gult, so festi mamma eld í tey og setti tey á stólin har tey lýstu so vakurt og fyltu rúmið við hugna og varma. So spurdi mamma, »hvat hava tit fingið? Lat meg síggja« So gleddist vit saman um gávurnar. Hesi minni renna fram fyri meg. Tað var so trygt og gott at vera barn.

So fóru vit at gera okkum kláran at fara í kirkju. Vit høvdu fingið nýggj klæðir. Tað var so hugnaligt at syngja hesar vælkendu jólasálmarnar. Ein, sum mær altíð hevur dáma best er sálmurin »Jól hava einglaljóð«. Hann fylti rúmið við einum sælum friði. Og tað var so gott at hoyra um Jesus, sum bleiv føddur í einum fjósi, og at hann var heimsins ljós og okkara frelsari.

Eg minnist so væl hendan vakra, lávaksna mannin, sum læs lestur. Og ein setningur sum hann læs til seinast, var at »Eingin má klandrast á jólum«. Tá trektu vit uppá smílibandið, tí vit vistu at hann fór at lesa tað. Jú, jólamorgun var nakað heilt serligt. Tá vit komu til hús, bleiv lestur lisin, vit sótu sum pinnar, sjálvt um vit vóru akkurát komin úr kirkju, men tað hoyrdi bara til, vit vóru von við at soleiðis var tað í okkara barnaheimi og tað var gott.

So fingu vit døgurða og dessert omaná. Ein ríkur morgun var komin at enda.

Hetta eru nøkur minnir - ja góð minnir frá míni barnatíð - jólamorgun.

Mugu øll fáa eini góð og signaði jól í Jesu navni.

## Íverksetan og nýhugsan

Val



**KITTY MAY ELLEFSEN**
Fólkaflokkurin

Føroyar skulu mennast til at vera eitt áhugavert stað hjá virkisfúsum fólki at byrja nýggja vinnu.

Í øðrum framkomnum londum er man tilvitaður um, at íverksetan hevur stóran týdning fyri máttin og vøksturin í búskapinum. Tað er í nýggjum virkjum og fyritøkum, at nýggj hugskot koma undan kavi og verða roynd.

Í londum sum Íslandi, Danmark, Írlandi og USA verða fólk frá barnsbeini eggjað til at gerast íverksetarar og lagt verður í tey, at íverksetarar eru slóðbrótandi og fyrimyndir. Arbeitt verður tilvitað fyri at skapa karmar soleiðis, at góð hugskot ikki detta niðurfyri, men ístaðin verða ment og handilsgjørd.

Føroyska fólkið er kreativt og dugur væl, at finna uppá. Serliga innan fyri tær kreativu vinnunar og innan tónleikin hava vit seinastu árini sæð nógvar spírar spretta fram, sum vit sum tjóð kunnu verða erin av. Men eisini innan aðrar vinnur spretta spírar og hugskotini eru mong.

Vit eiga tí, at arbeiða meira tilvitað fyri, at stimbra uppundir íverksetan. Fyri at ala fram ein betri íverksetarahugburð, er umráðandi at byrja tíðliga og tí er ein eyðsýndur møguleiki at byrja í fólkaskúlanum.

Somuleiðis skulu íverksetarar fáa betur atgongd til váðafúsan kapital og nýggj fíggjaramboð skulu geva íverksetarum betri møguleika at fáa kapital til hugskot síni. Almennu byrðurnar skulu gerast einfaldari við nýggum loysnum og miðvísari ráðgeving. Ein íløgukonto skal gera tað læ ttari hjá íverksetarum at spara saman til egið virkið. Somuleiðis, sum vinnulóggáva og aðrar lógir, sum hava týdning fyri umstøðurnar hjá íverksetarum, verða smidliggjørdar og dagførdar eftir altjóða leisti.

Hetta er eitt mál, sum komandi samgonga eigur at raðfesta høgt soleiðis, at ítøkilig úrslit náast. Hesum vil eg arbeiða fyri.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.